# Umhvørviskanningin



Kári Thomsen

Í farnu viku varð óhugnaliga heimsmet okkara í dálking av lufthavinum avdúkað í útvarpi og sjónvarpi. Oljumálaráðið hevur fingið kanningina lidna av nøgdini av vakstrarhúsgassunum koltvíilta (CO2), metan (CH4), køvievni (Nox) og ørum fluorbundnum gassum m.a. HFC, PFC og CFC. Gassini stava fyrst og fremst frá nýtsluni av olju og úrdrátti haðani, men eisini frá landbúnaði, brennistøðum og ídnaði.

Undirritaði legði fyri ári síðan fram frágreiðingina »Vindmylluatlas fyri Føroyar«, har m.a. varð víst á hóskandi støð til uppsetan av vindmyllum, og at vit allarhelst vóru millum mest dálkandi lond í heiminum júst innan útlát av vakstrarhúsgassum. Bert Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya hava opinbart fingið hendur á kanningini, og vil eg tí halda mær frá at gera neyvar viðmerkingar til úrslitið, tó eg hefti meg við stabba- og strikumyndir, ið sjónvarpið vísti, at meðan lond kring okkum hava lækkandi útlát, so økjast hesi hjá okkum. Kanningin er uppgjørd fyri 1995 og er økingin síðan uml. 10% um árið. Útlát frá royndarboringum eru eisini tikin við í kanningina og gera eisini sítt til at tølini blíva høg.

Í samrøðu við tíðindamannin Leif Lágadal metti eg løgmaður átti at lagt frá sær og útskriva nýval. Hesum vil eg standa við, tá støðan í landinum neyvan hevur verið meira fløkjaslig og vanstýrd seinru 50 árini. Málið snýr seg ikki um teir persónar, sum í løtuni manna landsins stýrið, men um eina tjóð og eitt fólk, ið hevur krav uppá at skil og skynsemið er í staklutum og heidarætlanum landsins. Eitt er at vit fullkomuliga eru heft at dagsins orkuveiting, ið er treytin fyri øllum hjólum samfelagsins á landi og sjógvi – og verandi livifóti, men trupult verður, fyri ikki at siga ógjørligt, at grundgeva fyri umheiminum, hví vit skulu hava sersømdir innan hesa vandamiklu dálking.

Heimsráðstevnan um burðadygga menning og veðurlagsbroytingar er hildin fyri aðru ferð, fyrst í Rio De Janeiro i 1992 og í ár í Johannesburg. Við Koyoto protokollini frá 1997 um avmarkingar í útlátum av vakstrarhúsgassum fyri at tálma óheppnu hitaøkingina av Jørðini, átti ávaringarlúrarnir fyri langt síðan at verðir hoyrdir úti í Nesinum.

Hin 9. november 1998 hevur løgmaður á fundi í Oslo, saman við leiðarunum fyri norðanlondini, Áland og Grønland, váttað, at føroyingar vilja vera við í menning og umlegging til burðardygg norðanlond. Ein av høvuðslinjunum í hesi menning er, at atlit til umhvørvið verður integrerað í 6 samfelagsøki ella sektorar. Hesir eru orka, landbúnaður, ídnaður, fiskivinna og jarðar- og skógarbrúk. Onnur tvørsektoriel mál eru m.a. veðurlag, lívfrøðiligt margfaldni, havið, evnafrøði og matvørutrygd.

Løgmaður hevur ábyrgdina av at landsstýrismenn útinna sítt arbeiði til lýtar, og roknað verður við, at hann hevur givið teimum frágreiðing frá fundinum í Oslo. Landsstýrismaðurin í umhvørvismálum Eyðun Eltør hevur eftir mínari meting sæð skriftina á vegginum, og hevur gjørt ávís tiltøk rætta vegin m.a. við aðalorðaskifti 22.januar um umhvørvismál. Eitt orðaskifti har allir (møttir) løgtings- og landsstýrismenn vóru á einum máli, at nú skuldi gongd setast á dagføringar og nýgerð av náttúru- og umhvørvislógum og kunngerðum og harafturat skuldi orðast ein umhvørvis- og orkupolitikkur, og óheft nevnd skuldi setast at kanna alternativar orkukeldur.

Eyðun Eltør hevur fingið til vega eitt fyrsta »Uppkast til føroyska ætlan um burðardygga mennning« dagfest 4. januar í ár, og hevur skipað fleiri fundir í samband við Agenda 21 fyri kommunuumboð og áhugað annars. Afturat hesum játtaði Eyðun Eltør stuðul til ger av áður nevnda »Vindmylluatlas fyri Føroyar« fyriuttan at »Orku- og Umhvørvisráðstevnan«, ið Føroya Náttúruverndarfelag skipaði 2.- og 3. mai, fekk sera positiva viðger og fíggjarligan stuðul soleiðis at ráðstevnan kundi haldast. Rætt skal eisini verða rætt, at Anfinn Kalsberg løgmaður í hesum sambandi var positivur í allar mátar og gav góð ráð og sítt besta viðmæli.

Kanska er ov lítil futtur í Eyðun Eltør at orða og skipa umhvørvispolitikkin til eina ítøkiliga verkætlan at leggja fyri Løgtingið. Óheppi varð eisini at biði varð um fyrivarni fyri føroyingum í møguligu oljuvinnuni líkasum vantandi undirtøkan við Kyotoprotokollini í Johannesburg, grundað á tørvandi hagtøl, ikki bleiv staðfest. Mál kundu verið sett fyri avmarking í útlátum, men bleiv hetta ikki gjørt.

Minnist meg rætt er eingin landsstýrismaður við ábyrgd fyri umhvørvismálum, ið áður hevur útint tað, ið Eyðun Eltør hevur gjørt hesum viðvíkjandi. Oljumálið kann tykjast meira áhugavert og tíðarkrevjandi, og kann ein ivast um landsstýrismaðurin hevur stundir at seta seg væl og viriliga inn í alstóru og krevjandi uppgávuna innan náttúru- og umhvørvisvernd. Eg haldi ikki orsøk er at seta fram misálit á Eyðun Eltør, og harmist um tað sera persónliga og ódámligu skriving, ið nýggi skrivarin hjá javnaðarflokkinum, Hans Pauli Strøm, leggur til brots við í Sosialinum 9. November.

Náttúru- og umhvørvismál hevur aldrin verið í høgum metum hjá føroyskum politikarum, mest ein viðfáningur, ið ikki skuldi takast í serligum álvara. Við vóru ávarað ikki at leggja umhvørvismál í sama stýri ella ráð sum oljumál, tá hetta kundi geva óheppnar ábendingar til umheimin, at umhvørvisreglur okkara kundu tillagast oljuvinnuna so henda ikki fekk ov nógvar forðingar. Trupulleikar eru tó ikki íkomnir, men loysnin er ikki heppin.

Til ber at minka um útlátini av vækstrarhúsgassum við forboðum um innflutning og nýtslu av t.d. bjálving, kølievnum og spraydunkum, ið m.a. innihalda HFC, PFC, og CFC-evni, ið hava ovurhonds stórt árin í samband við vakstrarhúsfyribrygdið.

Forboð, avgjøld og miðvísar reglur og kunngerðir kunnu setast í verk innan øll øki har vakstrarhúsgassini koma fyri. Avgjøld á t.d. handilstøð og oljunýtslu hjá stórbrúkarum, lúkan av krøvunum til roykreinsing á brennistøðunum og miðvísa endurnýtslu, CO2 og SO2 avgjøld, ið kunnu fara í grunn til menning av varandi orkuútbygging. Herd krøv til roykreinsing hjá fiskiflotanum og øllum akførum, ið nýta dieselolju. Kunngerðir um orkusparandi el-perur og rútar í øllum almennum bygningum, gerð av landsbyggireglugerð, avsláttur til fólk, ið vilja seta upp netbundnar sólkyknur til elframleiðslu og sólpanelir til upphiting, - fyri bert at nevna nøkur fá dømi. Slík tiltøk minka nakað um vakstrarhúsgassini, tó at hetta kann taka fleiri ár innan broyting hómast. Oljunýtslan er í nøgd nógv størsti syndarin, men kunnu vit – um politikarnir hava vilja og rygg til at gera nakað við tað, minka um útlatið við upp móti 20% uppá 2 til 3 ár.

Hesum skal eg grundgeva gjølliga fyri komandi viku, og í tí viðfangið siga nakað um burðardygga menning, náttúruvernd og hví ein broyting í skipan og umsiting av ávísum málsøkjum innan landsstýrið og samband tess við kommunurnar verður neyðug.

Í middagstíðindunum i útvarpinum mánadagin 11. november nevndi Finnbogi Joensen, Vestmanna, at umhvørviskanningin var verunleikafjarð. Oljumálastyrið og Heilsufrøðiliga Starvsstovan standa inni fyri kanningini, ið er gjørd av serkønum fólki, og eiga vit ikki at sáa iva um úrslitið. Kanninggin verður tøk innan stutta tíð, og eru villur í, kunnu hesar avdúkast tá.

Harafturmóti er lítið positivt at siga um landsstýrismannin í orkumálum, Bjarna Djurholm, ið ikki kundi stuðla við eini einasti krónu. Peningur var ikki tøkur til slík endamál kanska tí einstakur vinmaður, folkafloksmaður og fyrrverandi stýrislimur í SEV hevði fingið hálvtannað ára heimaarbeiði til at orða ein orkupolitikk fyri landsstýrismannin – ein uppgáva, ið gerast kann ein leygardag fyrrapart.

# Næmingar kanna føroyska gráspurvin

**Skrivligar keldur siga, at gráspurvurin kom fyrst til Suðuroyar. Hetta var stutt fyri ella undir seinna heimsbardaga. Nøkur ár seinni var fuglurin eisini at finna á øðrum støðum í Føroyum, eitt nú í Havn, Klaksvík, Fuglafirði, Svínoy og í Norðragøtu**

FUGLAR
*Vilmund Jacobsen*

Tveir næmingar á Náttúruvísindadeildini, sum stremba eftir eini lívfrøðisútbúgving á Fróðskaparsetrinum, royna sum lið í eini bachelor-uppgávu at kanna ymiska vitan um føroyska gráspurvin. Tey heita tí á fólk, sum vita okkurt um gráspurvin at siga, um at venda sær til Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetrinum, tlf. 352550 ella við at senda ein e-post til EydfinnM@Setur.fo

Uppgávan hjá næmingunum ber heitið »Útbreiðsla og tal av gráspurvum í Føroyum sæð frá einum metapopulatións sjónarmiði«.

– Ein partur av hesi uppgávu er at gera eitt kort sum lýsir, nær gráspurvurin er komin til tær ymisku bygdirnar í Føroyum.



*Talið av gráspurvum í teimum einstøku bygdunum í Føroyum. Nullið vísir til bygdir við ongum gráspurvum. Føroyski gráspurvastovnurin er umleið 2.500 pør*

### Fyrst til Suðuroyar

Út frá skrivligum keldum, vita næmingarnir at siga, at gráspurvurin kom fyrst til Suðuroyar. Hetta var stutt fyri ella undir seinna heimsbardaga. Nøkur ár seinni var fuglurin eisini at finna á øðrum støðum í Føroyum, eitt nú í Havn, Klaksvík, Fuglafirði, Svínoy og í Norðragøtu.

– Við at leita í ymiskum skrivligum keldum og við at tosa við fólk, vita vit eisini, hvat ár – ella nær á leið – gráspurvurin er komin til aðrar bygdir í Føroyum.

Kortið, sum næmingarnir hava teknað, vísir, at tað eisini eru bygdir í Føroyum, sum teir lítið ella einki vita um, og serliga eru fáar upplýsingar um bygdirnar í Eysturoynni. Men allar oyggjarnar hava sjálvsagt stóran áhuga.

– So, veitst tú, nær gráspurvurin er komin til onkra av bygdunum, vilja vit fegin frætta, siga næmingarnir og leggja aftrat, at ikki er neyðugt, at tú nágreiniliga veitst, hvat ár spurvurin er komin til bygdina. Upplýsingar um, at hann er komin fyri ella eftir eitt ávíst tíðarskeið, eru eisini virðismiklir.

### Merktir spurvar

Næmingarnir vilja hava at vita, um tað eru ár, har eingir gráspurvar hava verið – og eisini, um tað eru ár, har serliga nógvur gráspurvur var.

– Vit hava merkt gráspurvar í Havn við litringum um beinini. Sært tú onkran av hesum, høvdu vit verið fegin, um tit skrivaðu litirnar á eitt pappír og søgdu okkum frá.

Næmingarnir, sum arbeiða við og skriva uppgávuna um gráspurvin í Føroyum, eru Laura Mary Joensen og Kirstin Eliasen. Lærarafólkini eru Eyðfinn Magnussen og Sven A. Bengtson.



# Barsilsskipanin broytast



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, fer ein av komandi døgunum at leggja uppskot fyri løgtingið um at broyta Barsilsskipanina. Tvær høvuðsbroytingar eru: rætturin at vera í barnsburðarfarloyvi verður øktur upp í 52 vikur, og útgjaldingargrundarlagið verður broytt, so tað verður roknað eftir miðalinntøkuni seinastu 12 mánaðirnar.*

**Tíðin, ið fólk kunnu vera í barsil, verður longd upp í 52 vikur, tó í fyrstu atløgu uttan løn. Samtíðis verður útgjaldið broytt, so tað verður roknað eftir miðalinntøkuni seinastu 12 mánaðirnar. Hetta eru broytingarnar í lógaruppskotinum, sum Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, fer at leggja fyri løgtingið seinni í vikuni. Landsstýrismaðurin væntar at spara umleið 10 milliónir krónur við at broyta útrokningarháttin**

BARSILSSKIPANIN
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Barsilsskipanin, ið skjótt hevur hálvt annað ár á baki, skal nú broytast. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sum eisini varir av Barsilsskipanini, er liðugur við eitt uppskot um at broyta skipanina. Uppskotið verður lagt fyri løgtingið ein at komandi døgunum.

Í høvuðsheitum er talan um tvær broytingar, verður uppskotið frá landsstýrismanninum samtykt. Í dag hava foreldur rætt til 26 vikur í barnsburðarfarloyvi við fullari løn, tó í mesta lagi 35.000 krónur um mánaðin. Mamman eigur 14 vikur einsamøll, pápin hevur rætt til tvær vikur í barnsburðarfarloyvi, og foreldrini avgera sjálvi, hvussu tey býta tær seinastu 10 vikurnar í farloyvi ímillum sín. Sambært uppskotinum skulu foreldur í framtíðini hava rætt til tilsamans 52 vikur í barnsburðarfarloyvi. Tó hava tey framvegis bara rætt til løn í 26 vikur.

Hin broytingin snýr seg um, hvussu útgjaldið úr Barsilsskipanini skal roknast. Foreldur hava sum nevnt rætt til fulla løn, meðan tey eru í barsil. Higartil hevur útgjaldið verið roknað eftir meðalinntøkuni seks teir bestu mánaðirnar seinasta árið. Men sambært uppskotinum hjá landsstýrismanninum verður útrokningargrundarlagið í framtíðini roknað sum mánaðarliga miðalinntøkan seinastu 12 mánaðirnar. Hetta er eisini í tráð við upprunaliga uppskotið frá Bjarna Djurholm fyri Barsilsskipanina, sum løgtingið tó síðan broytti.

- Endamálið er ikki at taka nakað frá nøkrum. Av tí at vit framvegis nýta miðal mánaðarligu inntøkuna seinasta árið sum útrokningargrundarlag, fáa øll tað, tey hava rætt til, sigur Bjarni Djurholm. Hann leggur afturat, at tað ber altíð til at kjakast um, hvørt broytingin er rættvís ella kanska órímilig. Sjálvur heldur hann, at rættast er at rokna útgjaldið eftir miðalinntøkuni seinasta árið, eins og upprunaliga var ætlanin við Barsilsskipanini.

Av tí at útgjaldið higartil hevur verið roknað út eftir miðalinntøkuni, seks teir bestu mánaðirnar seinasta árið, hevur tað í ávísum føri borið til hjá fólki at »savna« sær løn saman, m.a. við at fáa arbeiðsgevara at bíða við at flyta løn, fyri á tann hátt at hækka útrokningargrundarlagið.

### Útgjaldsloftið óbroytt

Við verandi skipan hava foreldur rætt til fulla løn í barnsburðarfarloyvinum, tó í mesta lagi 35.000 krónur um mánaðin.

At loftið er sett so høgt hevur fingið ilt í fleiri fakfeløg, ið ikki meta tað vera rætt og rímiligt, at útgjaldið úr Barsilsskipanini skal kunna vera meiri enn dupult so høgt sum lønin hjá verkafólki. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, hevur tó ongar ætlanir um at broyta útgjaldsloftið. Hann vísir á, at tað bara eru heilt fá, ið fáa hægsta útgjald úr Barsilsskipanini, ið annars ikki hava rætt til fulla løn í barnsburðarfarloyvi.

- Øll alment lønt, umframt øll tey í privatu vinnuni, sum hava sáttmálar, ið líkjast teimum hjá tí almenna, hava í sínum sáttmálum rætt til fult lønarendurgjald í samband við barsil. Hesin rættur liggur omanfyri ásetingarnar fyri Barsilsskipanina, og tí eru tað bara heilt fá, ið fáa ágóðan av at útgjaldsloftið er so høgt, sigur Bjarni Djurholm. Og av tí at talan er um heilt fá fólk, er hetta ikki nøkur stór fíggjarlig útreiðsla fyri Barsilsskipanina. Bjarni Djurholm sigur seg tó duga at skilja, at høga útgjaldsloftið kann fella í eyguni hjá summum.

### Spara 10 milliónir

Í ár fer Barsilsskipanin at kosta 71 milliónir krónur, og í fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár verður skipanin mett at kosta 66,3 milliónir. Av teimum 66,3 milliónunum, ið skipanin er mett at kosta næsta ár, gjalda løntakarar og arbeiðsgevarar tilsamans 29 milliónir í Barsilsgjaldi, ið er 0,25 prosent fyri hvønn partin á arbeiðsmarknaðinum.

Bjarni Djurholm sigur, at broytingarnar í útrokningargrundarlagnum fara at merkja, at skipanin gerst umleið 10 milliónir krónur bíligari næsta ár. Talan verður tó ikki um at skipanin sjálv skal sleppa at varðveita henda pening, t.d. til at nýta til at leingja tíðarskeiðið, ið fólk hava rætt til farloyvi við løn. Broytingarnar eru liður í fleiri sparitiltøkum hjá Vinnumálaráðnum, og pengarnir enda tískil aftur í landskassanum.

### Longt barsil uttan løn

Í fyrstu atløgu verða tær 26 vikurnar, ið barnsburðarfarloyvi verður longt, uttan løn. Bjarni Djurholm sigur, at hann seinni í ár fer at taka henda spurning uppaftur. Hetta skal gerast saman við arbeiðsmarknaðinum.

- Skal tíðarskeiðið, har fólk hava rætt til barnsburðarfarloyvi við løn, leingjast, so skal tað gerast í samstarv við partarnar á arbeiðsmarknaðinum, sigur Bjarni Djurholm.

Tá ALS herfyri gjørdi av, at inngjaldið til arbeiðsloysisskipanina skal lækka á nýggjárinum, kom fram, at lækkingin møguliga kann nýtast til at bøta um Barsilsskipanina. Bjarni Djurholm metir framvegis, at hetta er ein spurningur, ið eigur at takast við í viðgerðina, saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

- Eg meti, at lækkingin í inngjaldinum til ALS framvegis eigur at takast við í viðgerðina og metingina av, um vit ikki kunnu bøta um Barsilsskipanina, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, ið tó ikki frammanundan vil binda seg til hesa loysn.

Eftir ætlan skal broytingin í Barsilsskipanini koma í gildi 1.januar næsta ár.

## FAKTABOKS

Foreldur hava rætt til barnsburðarfarloyvi við løn í 26 vikur. Mamman eigur einsamøll 14 vikur, og í hesum tíðarskeiði hevur pápin eisini rætt til tvær vikur í farloyvi. Foreldrini kunnu síðan sjálvi avgera, hvør teirra skal nýta tær írestandi 10 vikurnar.

Broytingin, ið eftir ætlan skal koma í gildi á nýggjárinum, fevnir bara um tíðarskeiðið eftir at tey hava nýtt nevndu 26 vikur við løn. Broytingin gevur foreldrunum rætt til at vera í barnsburðarfarloyvi í tilsamans eitt ár, og tey skulu sjálvi sleppa at gera av, hvussu leingi hvør teirra er í farloyvi. Tíðarskeiðið, ið tey eru í farloyvi afturat verandi 26 vikum, er tó uttan løn.

Útgjaldið úr Barsilsskipanini verður í dag roknað eftir meðal mánaðarligu inntøkuni, seks teir bestu samanhangandi mánaðirnar, síðsta árið. Verður uppskotið hjá Bjarna Djurholm samtykt, verður útgjaldið roknað eftir miðal mánaðarligu inntøkuni, javnt býtt yvir seinasta árið.